Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Sum av torvheiðum

Oddagrein

Landsstýrið kom aftur frá samráðingunum sum av torvheiðum. Einki sum helst tyngir leypin. Og tað, sum landsstýrið helt vera eitt jarnbrot fyri at fáa glið á samráðingarnar um skiftistíðina - komandi oljuinntøkur - varð kveistrað til viks. Danska stjórnin gjørdi einaferð afturat greitt, at skiftistíðin verður trý til fýra ár. Vilja føroyingar úr ríkisfelagsskapinum, og taka ábyrgd av egnum landi, mugu teir eisini taka tað búskaparligu ábyrgdina á seg er sjónarmiðið hjá stjórnini.

So er spurningurin, um tað ber til ella ikki. Sjálvandi ber tað til, sum fleiri tjóðveldisfólk halda. Men so er avleiðingin, at livistigið í Føroyum minkar rættiliga nógv. Vit koma niður á skotsk livistig, sum danski forsætismálaráðharrin segði. Og er tað so galið, vil onkur siga. Tað má kosta at seta føtur undir egið borð.

Men eitt er livistøðið. Eitt annað er, um føroyska samfelagið er búgvið at taka á seg allar tær fyrisitingarligu uppgávurnar, sum koma í kjalarvørrinum. Eitt er rættarskipanin. Eitt annað er allir tær uppgávur, sum danskir stovnar reka fyri føroyingar í dag. Eitt annað er altjóða viðurskifti. Verjuspurningurin. Marknaðarviðurskifti o.s.fr.

Bitin at gloypa er ov stórur. Tað má landsstýrið helst fara at ásanna, nú tað kemur norður aftur á 62. breiddarstig, her kalda landssynningslotið kann fáa knokkarnar at hugsa meiri skynsamt enn lýggja lotið á Slotsholminum ígjár. Tað er ikki neyðugt at fara eftir øllum í senn, sum sam-gongupolitikkari sigur eftir miseydnaðu samráðingarnar.

Landsstýrið eigur ikki at fara frá, sum Sambandsflokkurin mælir til. Landsstýrið hevur fullar rætt at halda fram við samráðingunum. Men landsstýrið eigur at ásanna, at tað hevur ikki meiriluta aftan fyri seg longur. Løgmaður eigur tí at fylgja ráðnum hjá Javnaðarflokkinum og saðla av nýggjum.

Tað er - og eigur sambært fflokksskráunum - at vera meiriluti fyri eini aðrar loysn enn tí víðgongdu fullveldisætlanini. Ein loysn, sum greiðir tær fløkjur, sum nú eru, og sum setir eitt mál fyri, at Føroyar eiga at gerast búskaparliga sjálvberandi og at sjálvstýrið økist í stigum. Rómaborg varð ikki bygd eftir einum degi, og tað verða Føroyar sum fullveldisríki heldur ikki. Latum okkum ikki steðga á, men latum okkum siga okkum sjálvum, hvat ber til. Og tað eigur at bera til, at leggja ein politikk, sum í stigum flytur okkum fram á sjálvstýrisleið.

Sosialurin

Viðmerking:

Den færøske befolknings valg

Kære færinger

Vi har levet sammen i tykt og tyndt i Rigsfællesskabet gennem mange hundrede år. Jeres deltagelse i det danske samfund er værdifuldt og anerkendt af os alle. Mange færinger har valgt at bo og arbejde i Danmark. Vi skelner ikke mellem jer og andre danske statsborgere. I er en vigtig del af vort samfund og vort fællesskab. Præcis som det er tilfældet med de danskere, der bor og arbejder på Færøerne.

Rigsfællesskabet kan ikke gøres op i tal og paragraffer. Vores fællesskab bygger på gensidig respekt, samhørighed, solidaritet og retten til selvbestemmelse. Det er den fælles historie, de nære familiemæssige bånd og den stærke kulturelle samhørighed, der knytter os sammen.

Men spørgsmålet er, hvad der skal ske med vores fælles fremtid? Regeringen ser helst, at Færøernes fremtid bliver inden for Rigsfællesskabet. Regeringen har også peget på muligheden for at erstatte hjemmestyreloven med et nyt og udvidet selvstyre inden for Rigsfællesskabets rammer. Men Landsstyret, Lagtinget og det færøske folk bestemmer selv retningen. En retning, som vi selvfølgelig respekterer.

Færøernes Landsstyre har sat omdannelsen af Færøerne til en suveræn stat og dermed udtræden af Rigsfællesskabet på dagsordenen. Regeringen og Landsstyret har nu i tre forhandlingsrunder drøftet etableringen af Færøerne som en suveræn stat på baggrund af Landsstyrets oplæg.

Det er regeringens opfattelse, at vi er nået et godt stykke vej med arbejdet. Der er enighed om mange af de væsentlige spørgsmål, der vil være en forudsætning for, at Landsstyrets målsætning om en suveræn stat kan føres ud i livet. Regeringen har positivt spillet med og er indstillet på at hjælpe Færøerne godt på vej.

Hvis vi i dag gør status

over de færøsk/danske forhandlinger er billedet, at:

• En suveræn stat har sine egne statsborgere. Regeringen har derfor fremlagt forslag til, hvordan man ved oprettelsen af en færøsk stat kan finde en afgrænsning mellem et færøsk og dansk statsborgerskab. Landsstyret er enig i de principielle hovedlinier i regeringens løsningsforslag.

Regeringens standpunkt er, at fremtidige færøske statsborgere i Danmark skal ligestilles med andre nordiske statsborgere. Regeringen er indstillet på, at færinger, som har boet i Danmark i en længere årrække, vil kunne bevare deres hidtidige rettigheder, og dermed blive ligestillet med danske statsborgere.

• Landsstyret har ønsket, at der indgås samarbejdsaftaler med Danmark på en række områder. Det er regeringen indstillet på at forhandle om, hvordan det sker i praksis fra skibsinspektion, politiuddannelse, udenrigstjeneste m.v.

• Landsstyret har endvidere ønsket, at de monetære relationer mellem Danmark og Færøerne videreføres. Regeringen er indforstået, således at Færøerne kan indgå i en monetær union med Danmark. Vi skal nu forhandle de nærmere regler herfor.

• Landsstyret har ønsket en langvarig økonomisk overgangsordning. Regeringen har tilbudt en økonomisk overgangsordning på fire år, hvor de danske tilskud aftrappes.

***

Jeg vil gerne gøre lidt ud af spørgsmålet om den økonomiske overgangsordning, som viste sig at blive det centrale på mødet den 15. juni.

Jeg tror, at mange i deres stille sind måske godt kan forstå, at jeg som dansk statsminister har svært ved at overbevise den danske befolkning om at yde støtte til en suveræn stat i en periode på 15 år, hvis færingerne ikke længere ønsker at være en del af rigsfællesskabet. Pligter og økonomiske rettigheder må følges ad som i alle andre af livets sammenhænge.

Færøsk økonomi står i dag meget stærkt. Landskassens overskud ligger i størrelsesorden 600 millioner kroner i 1999 og forventes at blive tilsvarende stort i 2000. Skattetrykket er næsten 10 pct. lavere end i Danmark, og Landsstyrets formuebeholdning er ikke ubetydelig. Hertil kommer, at Færøerne samlet set har penge til gode (nettotilgodehavender) over for udlandet. Færøerne bør have alle forudsætninger for at skabe en sund, god og selvstændig økonomi.

Regeringen kan derfor ikke forpligte sig til over en længere årrække at yde et fast bidrag til levefoden på Færøerne. Regeringen har aldrig givet Landsstyret en sådan garanti. En sådan garanti ville for mig at se også være i modstrid med selve ånden i det færøske ønske om en fuld suveræn stat og dermed fuldt ansvar for egen økonomi.

Derimod har jeg allerede under mit besøg på Færøerne i september 1998 gjort det klart, at det er regeringens principielle grundsynspunkt, at ethvert valg har sine konsekvenser. Og at et færøsk valg af suveænitet nødvendigvis må have konsekvenser på det økonomiske område. Dette kan ikke komme bag på hverken Landsstyret.

I respekt for den færøske befolkning, Landstyre og Lagting finder jeg det vigtigt fra starten at sige tingene ærligt og direkte, så der ikke senere i forhandlingerne opstår misforståelser eller tillidskrise. På samtlige af vores forhandlingsmøder har jeg understreget regeringens standpunkt:

Det er regeringens opfattelse, at en fireårig overgangsperiode — kombineret med et fortsat samarbejde på en række områder, herunder en monetær union - vil sikre en velordnet og styret overgang til en selvstændig færøsk økonomi.

***

Kære færinger. Jeg vil slutte denne henvendelse til jer, som jeg begyndte den: Færøerne skal selv vælge den retning, der skal udgøre øernes fremtid. Jeg tror, at alle færinger ved, at der også er muligheder inden for rammerne af Rigsfællesskabet, men uanset hvordan vores veje vil forme sig, vil regeringen respektere det valg, der må og skal træffes af den færøske befolkning.

Med venlig hilsen
Statsminister Poul Nyrup Rasmussen

Nyrup fekk føroyska troyggju frá løgmanni

Anfinn Kallsberg gav danska forsætisráðharranum eina myrkamorreyða troyggju í føðingardagsgávu

Eyðun Klakstein
Keypmannahavn

Tá føroyska landsstýrið møtti til samráðingarfundin við donsku stjórnina hóskvøldið, høvdu tey eina gávu við í viðførinum. Gávan var til danska forsætisráðharran, sum fylti 57 ár hósdagin.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, handaði Poul Nyrup Rasmussen gávuna, sum var ein føroysk troyggja.

- Eg vóni ikki, at sambandið millum Føroyar og Danmark verður so kalt, at tað verður neyðugt við hesi troyggju, segði løgmaður, tá hann gav forsætisráðharranum troyggjuna.

Poul Nyrup Rasmussen, sum varð føddur í Esbjerg í 1943, hevur sitið á Fólkatingi síðani 1988. Hann hevur verið formaður í danska Javnaðarflokkinum síðani 1992, tá hann tók við eftir Svend Auken, og hann hevur verið forsætisráðharri síðani 1993.

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins umsamráðingarúrslitið:

Fullveldi uppá borg

Landsstýrið er koyrt fast. Skiftistíðin er og verður fýra ár. Tí má landsstýrið gera støðuna upp. Antin at leggja frá sær og lata aðrar royna seg ella koyra samráðingarúrslitið út til fólkaatkvøðu sigur formaður Javnaðarfloksins Hann heldur tað annars vera fullkomiliga burturvið, tá landsstýrið vil geva dønum pant í undirgrundini, sum tað ikki sjálvt metir okkum eiga ognarrættin til

JAN MÜLLER

- Longu aftaná 1. samráðingarumfar 17. mars og fleiri ferðir eftir tað hevur løgmaður sagt, at verður talan um eina skiftistíð uppá 4 ár, so verður ikki talan um nakra fólkaatkvøðu. Nú hava vit tríggjar ferðir á rað fingið eina krystallklára útmelding frá donsku stjórnini, at talan verður bara um fýra ár. Og ein logisk avleiðing av tí má vera, at løgmaður ger støðu sína upp sigur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins í viðmerking til samráðingarnar í Danmark og hann staðfestir, at løgmaður er koyrdur fastur í fullveldisætlanini. Er man ikki nøgdur við úrslitið, so má man leggja frá sær og lata aðrar royna seg.

Formaðurin fyri størsta andstøðuflokkin heldur, at tað er ein trupulleiki fyri Føroyar, at vit hava eitt landsstýri, sum ikki dugir at síggja henda veruleikan í eyguni.

-Ein donsk stjórn meldar ikki tríggjar ferðir so klárt út um eina skiftistíð fyri seinni at broyta hana. Eg haldi eisini, at hetta var seinasta desperata loysn, sum landsstýrið gjørdi, nevniliga hana at vilja selja út av okkara møguligu oljuinntøkum. Heldur ikki tað fekk donsku stjórnina at býta á. So mugu teir væl viðurkenna, at ein skiftistíð uppá fýra ár er vorðin veruleiki.

Jóannes Eidesgaard vísir á tað Høgni Hoydal segði eftir 2. samráðingarumfar. Tá segði hann, at 90% av viðurskiftunum vóru komin uppá pláss, og tað, sum var útistandandi var so skiftistíðin. -Fyri mær at síggja er hon komin uppá pláss. At man so ikki er nøgdur við úrslitið, er so ein síða av málinum, men hetta er so tað endaliga úrslitið.

Jóannes Eidesgaard heldur tí, at landsstýrið bert hevur tvinnar kostir í at velja. Antin - um teir ikki eru nøgdir við úrslitið - at leggja frá sær og siga, at tá teirra upplegg ikki kundi vinna frama, so mugu aðrir royna seg - ella mugu teir siga, at hetta er úrslitið man kundi fáa, og so má Føroya fólk taka støðu. Tvs. so má ein fara til eina fólkaatkvøðu við eini skiftistíð uppá fýra ár.

Formaður Javnaðarfloksins er tó sannførdur um, at landsstýrið tvørturímóti ætlar sær at forhála og draga tingini út, samstundis meðan allur annar politikkur í Føroyum liggur á láni. Og tað vil hann ikki góðtaka.

-Eg haldi eisini, at tað, sum landsstýrisumboð hava sagt í danskari pressu verða sera óheppið fyri samráðingarandan. Høgni Hoydal nevndi m.a. at tað var donsk nationalisma og forfongiligheit, sum forðaði fyri føroyskum fullveldi. Eg má tí viðganga, at eg í veruleikanum var eitt sindur bangin fyri, at júst hesar samráðingar fóru at verða í einum anda, sum ikki sømir seg fyri tveir partar sum landsstýrið og stjórnin. Og úrslitið síggja vit eisini nú.

Vilja ikki røra tað við eldtong

Heldur ikkki spurningin um at taka ein triðja part inn í samráðingarnar heldur formaður Javnaðarfloksins tænir søkini ella er við til at betra um samráðingarandan.

-Tá man upplivir, at man undir samráðingunum hevur umhugsað at taka ein triðja part inn, so er hetta besta tekinið um, at tingini eru við at koma út í nakað, sum avgjørt ikki er sømiligt. Tað er mín sannføring, at tað er eingin myndugleiki, eingin stjórn og politikari í Norðurlondum, sum vil røra hetta málið við eini eldtong, uttan so at báðir partar eru samdir. Tú fær hvørki grønlendingar ella íslendingar at fara inn í hatta málið, soleiðis sum tað stendur nú.

Og tá tosað verður um at fáa ST uppí málið so sigur Jóannes Eidesgaard, at ST í dag er ein felagsskapur, sum hevur sítt størsta virksemi í tí partinum av heiminum, har tað er verulig neyð.

-Eg eri sannførdur um, at koma ST-eygleiðarar til Føroya, so vilja teir fáa ein skelk, tá teir síggja, hvussu gott vit hava tað. Tí trúgvi eg ikki, at landsstýrið fer at vinna nógva sympati innan ST. Viðurskiftini í Føroyum eru ikki nakað, sum er relevant fyri ST, í hvussu er ikki tá tað snýr seg um livistøði og at varðveita frið, nú løgmaður velur at brúka orð sum kúlur og kanónir í hesum samráðingarhøpinum.

Pantseting av undirgrund

Um tað, sum er komið fram um, at landsstýrið hevur boðið sær til at lata dønum møguligar komandi oljuinntøkur sum part av eini komandi avtalu við danir, heldur Jóannes Eidesgaard, at tað er fullkomiliga burturvið ikki minst, tá hugsað verður um ta støðu sum Tjóðveldisflokkurin og Høgni Hoydal hava í spurninginum um ognarrættin til undirgrundina.

-Høgni Hoydal sigur, at føroyingar hava ikki ognarrættin til undirgrundina. Vit hava bara umsitingarrættin. Tað er ein øgilig andstøgn í tí, um hann so heldur, at man kann fara til Danmarkar og pantseta somu undirgrund. Tú kanst ikki pantseta nakað, sum tú ikki eigur. Tú kanst ikki pantseta ognina hjá grannanum. Tú kanst bara pantseta eina ogn, sum tú sjálvur hevur fult harradømi og ræði yvir.

Jóannes Eidesgaard minnir í hesum viðfangi á, at tað kom ikki glið á undirgrundarsamráðingarnar fyrr enn føroyingar sleptu kravinum um yvirvaldsrættin.

-Hann er heldur ikki tann, sum hevur praktiskan týðning. Vit hava dispositiónsrættin, og tað er hann, sum hevur týðning.

Formaður Javnaðarfloksins heldur tað eisini vera eina óvirðliga gongd at taka oljuna við í eina samráðing, tá vit ikki vita nakað við vissu um hesa olju. Tað er ein óvirðlig støða, tá landsstýrið fer og sigur, at man nú tekur pant í nøkrum, sum er framtíðin ikki bert hjá okkum, men eisini hjá okkara eftirkomarum. Ein logisk fylgja av hesum vildi verið at spurt, hví landsstýrið ikki fer út á lánimarknaðin og biður um hesi lánini fyri 11 árini av skiftistíðini? Eg eri vísur í, at oljufeløgini høvdu játtað lán uppá tað, sum svarar til tað, sum vit høvdu fingið í stuðuli í 11 ár við eini lagaligari rentu ella kanska ongari rentu, um tey fáa fría atgongd til framtíðar føroyskt oljuríkidømi. Hetta er einki annað enn ein hasarderað ella desperat handling frá landsstýrissins síðu, tí man vil hava eitt gjøgnumbrot í tí, sum eitur skiftistíðis. Men sum sagt, tað beit Nyrup ikki á. Og tí má man kunna staðfesta, at skiftistíðin er endaliga avgreidd.

-Støðan í løtuni er tann, sigur Jóannes Eidesgaard víðari, at samráðingarnar eru koyrdar fastar. Danska stjórnin fer ikki longur við skiftistíðini. Nú vil landsstýrið so til at samráðast aftur eftir summarfrítíðina. Men eg eri vísur í, at aftaná 4. og uppaftur fleiri umfør so fær man somu skiftistíð, fýra ár.

Landsstýrið má gera støðuna upp nú. Valskeiðið er farið at halla, og tað er bert eitt ár eftir. Tí má Føroya fólk nú vita, hvat landsstýrið ætlar, eftir at tað hevur koyrt fast í fullveldisætlanini.

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins

Bilpakkar sumarið 2000
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

4 fólk í bili

Danmark
Fráf. Tórshavn 1/9 8/9
Fráf. Hanstholm 17/6 19/8 26/8 2/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hanstholm ella hinvegin
árið 775,- fyri hvønn

Noreg
Ferðist bíliga, Tórshavn-Bergen ella hinvegin
árið 480,- fyri hvønn

Hetland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Lerwick ella hinvegin
árið 385,- fyri hvønn

Island
Fráf. Tórshavn 21/6 9/8 16/8 23/8 30/8
Fráf. Seyðisfjørður 22/6 24/8 31/8 7/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Seyðisfjørður ella hinvegin
árið 728,- fyri hvønn

Skotland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hetland-Skotland ella hinvegin
árið 1.273,- fyri hvønn

e-mail: booking@smyril-line.fo